# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Vit heilsa grannunum

Føroyingar ivast ikki í, at íslendingar eru okkara bestu frændir. Hóast førleikin til innanhýsis samskifti her norðuri í Atlantshavinum ikki er tann besti, so kenna vit bondini at vera sterk. Føroyingar hava búð og búgva í Íslandi, og íslendingar hava búð og búgva í Føroyum. Føroyingar hava funnið arbeiði á landi og sjógvi í Íslandi, tá ið tað ikki hevur staðið so væl til heima hjá okkum sjálvum, og íslendingar hava funnið arbeiði í Føroyum, tá ið tað ikki hevur staðið so væl til har yviri. Soleiðis hevur tað verið, og soleiðis er tað.

Í hesum døgum hava óvanliga nógvir føroyingar eitt vakið eyga við, hvussu tað gongst grannanum fyri vestan. Talan er um syndarliga búskaparkreppu, og í kjalarvørrinum á henni er turbolensurin í politisku skipanini so mikið stórur, at tað nú er rættulig politisk kreppa og harvið samfelagslig kreppa í Íslandi.

Vit eiga at læra av søguni, verður sagt. Men samstundis mugu vit ásanna, at dømini eru nógv um, hvussu skjótt vit gloyma søguna. Síðsta dømið her heima hjá okkum sjálvum er, at tað bara tók nøkur ár at sleppa fótafestinum, eftir at vit sum samfelag vóru komin burtur úr stóru búskaparligu, politisku og samfelagsligu kreppuni fyri knappliga tjúgu árum síðani.

Íslendingar eru meint raktir, og vit hava samkenslu við teimum. Teir kenna sviðan av, hvussu tað tørnar út, tá ið spekulatión og løtuvinningur verða girað og mett hægri enn almennar vælferðartænastur, og tá ið samhaldsfesti verður slept upp á fjall, tí solospælararnir við hjálp frá tillagaðum lógum og almennum skipanum annars fáa frítt at fara.

Ballið er buðið. Ótamda liberalisman hevur spælt fullkomuliga fallit, og nú er tað upp til vanliga íslendska skattgjaldaran at taka upp og vísa samhaldsfesti. Tað er einki at undrast á, at tað prutlar undir lokinum, og at tað viðhvørt flýtur yvir. Serliga tá ið tað vísir seg, at sessurin framvegis tykist tryggur undir teimum, sum hava spælt fyrstu violin, meðan hetta hevur gingið fyri seg.

Íslendska stjórnarskipanin stendur sína roynd í hesum døgum. Forsetin er í brennideplinum, nú tað er upp til hansara at gera av, hvør skal skipa stjórn. Flokksleiðslurnar fara at vísa, at tær boyggja seg fyri hesum. Tað hevur týdning fyri Ísland sum land og tjóð, at hetta fer at ganga fyri seg soleiðis, sum tað er ásett í grundreglunum fyri samfelagið. Júst í sovornum støðum er tað, at skipanin skal vísa, hvør dugur er í henni.

Hvørjar avleiðingar íslendingar á valinum um hálvan fjórða mánað fara at taka av, at teir eru komnir í so djúpan aldudal, fer tíðin at vísa. Men síðani 2. heimsbardaga er tað ikki komið fyri í okkara parti av heiminum, at fólkið hevur reagerað so ógvusliga, sum íslendingar í hugburði og atburði hava gjørt seinastu vikurnar.

Hetta vísir, at tað svíður hjá teimum, og vit heilsa teimum og vísa teimum samhuga. Gævi at vit saman við teimum lærdu, hvussu tað gongst, tá ið dygdirnar, sum okkara samfeløg nógvu tey seinastu árini hava verið grundað á, verða goymdar og gloymdar.

**Sosialurin**

## 10 minuttir av 1440

**TORDUR J. NICLASEN**
Eysturoyar Røktar-og ellisheim



### Áheitan á Kringvarpið

Í mong, mong ár hevur morgunlesturin í Kringvarpinum uttan iva havt ein sera stóran lurtaraskara og hevur henda sending verið til gleði og signing fyri mong. Tað skal Kringvarpið hava tøkk fyri!

Tað at morgunlesturin varð endursendur kl. 9.50 gjørdi, at øll tey, sum ikki vóru "á fótum" kl. 7.05 fingu lut í endursendingini kl. 9.50.

Hesi "øll" ið sipað verður til, eru tey mongu av okkara landsmonnum og kvinnum, sum búleikast á sambýlum og røktarheimum kring landið. Hetta at lurta eftir morgunlestrinum júst kl. 9.50 gjørdist ein fastur táttur í dagligdegnum. Vit vita hvønn týdning júst hesir 10 minuttur hava havt fyri hesi mongu!

Ikki er tað tí so løgið at tey í dag harmast stórliga, at júst hesir 10 minuttir av skránni hjá Kringvarpinum er strikaðir! 10 minuttir av eini døgnskrá uppá 1440 minuttir!

Øll kunnu mistaka segsjálvt tann besti! Her hevur Kringvarpið, ella tey ið har ábyrgdast fyri hesum, stórliga mistikið seg!

Tí skal mín einfalda og innarliga áheitan á Kringvarpið verða: Rættið misstakið og latið hesar 10 minuttirnar aftur koma til sín rætt!

Tey íð búgva og vit, ið starvast á sørsta røktar-og ellisheimi í landinum vita hvønn týdning júst endursendingin kl. 9,50 hevur havt og eri eg sannførdur um, at búfólk eins væl starvsfólk á sambýlum og hinum røktarheimunum kring landið eru av somu áskoðan og taka undir við hesi áheitan!

Somuleiðis ivist eg ikki eina løtu í at flestu pensionistar og onnur við høvdu bæði verið fegin og takksom fyri, at nevndu 10 minuttir aftur komu á skrá.

Vildu fegin frætt frá Kringvarpinum hvørja lagnu hendan áheitan fær.

## Lat tey eldru fáa morgunandaktina aftur

**SÓLFRÍÐ HEINESEN**

Mánadagurin 26. januar var ein sorgardagur hjá nógvum gomlum í okkara landi.

Nógv av teimum hava havt sum mál, at klára at vera uppi til morgunlesturin kl. 9.50, men mánadagin var eingin lestur at koma upp til. Hann er tikin av skránni med alla, sigst.

Morgunlesturin verður sendur hvønn morgun klokkan gott 7, og hetta er til gleði fyri mong, sum fara tíðliga upp og til arbeiðis vanliga tíð.

Tøkk skulu tit hava fyri tað.

Morgunandaktin hevur so verið endursend kl. 9.50. Hetta hevur verið til gleði fyri øll tey mongu, sum ikki fara til arbeiðis, og sum tí kunna lurta eftir andaktini seinni á morgni.

Hetta veit eg, tí eg arbeiði sjálv á einum eldrasambýli. Tey eldru hava glett seg til at byrja dagin við morgunandaktini, og hetta hevur verið ein hátíðarløta.

Eg eri ein av teimum mongu, sum undrist yvir, at tað í eini tíð, tá ið alt annars ber til, ikki skal kunna bera til at leggja 10 minuttir av senditíðini fyrrapartin til morgunandaktina.

Hesi eru hóast alt teir av okkara samborgarum, sum hava tænt samfelagnum í eitt heilt lív.

Eg fari so inniliga at heita á leiðsluna fyri kringvarpið um at taka hesa avgerð upp til nýggja viðgerð, og við virðing fyri okkara eldru, at geva teimum andaktina aftur.

## Svar til Felagið Nótaskip

**TINGMANNING JAVNAÐARFLOKKSINS**

Vísandi til bræv tykkara, sum er sent politisku flokkunum, takkar tingmanning Javnaðarfloksins fyri kunningina um fyribilsbýtið av svartkjaftakvotunum.

Eins og tit, undrast vit stórliga á, at skip, ið ikki fiska svartkjaft, fáa tillutað svartkjaftakvotu. Við hesum leggur landsstýrismaðurin beinleiðis upp til at gera kvotur, sum almennu Føroyar hava samráðst seg til, til handilsvøru hjá einstaklingum.

Nú Russland samráddi seg til 70% av føroysku svartkjaftakvotuni, og so mikið minni er eftir at býta okkara millum, er tað uppaftur meira ófatiligt, at tikið verður frá teimum, sum veruliga royna eftir svartkjafti, meðan aðrir koma at liggja oman á tilfeinginum til møguliga sølu. Hetta stríðir beinleiðis ímóti andanum í okkara fiskivinnulóggávu.

Fyri Javnaðarflokkin ber hetta boð um, at ferð nú má setast á arbeiðið at broyta okkara fiskivinnuskipan.

## 26 næmingar í flokkinum!?

**EYÐUN Á BORG**



Steðgið (boðsháttur fleirtal) hasum skriviborðs- og rokniarksfólkunum sum skjótast!!

Ver nú gott við skúlan, Mentaráðið!

Við skúlatrivnaðarkvøðu
A Borg á Argjum í torrasól 2008

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.